filmurin

Lagt til rættis: Kim Simonsen



# Eragon

## Ummæli



Kim Simonsen
kimsimonsen@hotmail.com

**Eragon er ein 15 ára gamal drongur, sum ein dag finnur ein bláan stein. Hann fer við honum heim til húsini hjá pápabeiggjanum. Steinurin er eitt drekaegg. Skjótt kemur ein drekaungi sum Eragon kallar Saphira.**

Ein dagin verður húsið hjá Eragon álopið av teim fíggindaligu Ra'zac og pápabeiggin verður dripin.

Saman við einum gomlum søgufrásagnarmanni, ið kallast Brom (Jeromy Irons), fara Eragon og drekin Saphira út at hevna deyðan hjá pápabeiggjanum. Hesin Brom, gerst lærumeistarin hjá Eragon. Og líka sum á ferðini hjá Frodo í Ringanna Harri, so lærir Eragon, mangt og hvat, hann lærir at berjast við svøri og at ganda.

### Drekareiðmaðurin

Eragon lærir um søgnina um Drekareiðmenninar í Ríkinum og bardagin hjá teimum móti ónda konginum Galbatorix. Eftir hetta er tað greitt , so fer hann at gerast drekareiðmaður.

Seinni verður Eragon bjargaður av hermanninum Murtagh, ið er sonur Morzan, ið var hin fyrsti drekareiðmaðurin. Hann er seinni, í besta Star Wars stíli, endaður við at arbeiða fyri tí ónda Galbatorix.

Tá Eragon og Murtagh royna at sleppa sær til rýmingar møta tey álvakvinnuni Arya. Hon var upprunaliga vørður at drekaeggunum. Nú er hon eitra av monnunum hjá Galbatorix. Skal hon bjargast, er hon noydd at berjast saman við Varden, sum er seinasta styrkin, ið berjist móti ónda konginum.

Eragon, Murtagh, Saphira og Arya fara øll saman at finna Varden, men onkur er komin við aftan á teimum.

### Høvundin bert 22 ár

Eragon er bók, skrivað av bert 22 ára gamla Christopher Paolinis. Hansara fantasy-skaldsøga er fyrri partur av trimum, kallaðar The Inheritance Trilogy. Tey bæði bindini, ið eru útgivin, kallast Eragon og Den ældste, útgivnar av forlaginum Sesam. Hesar eru báðar farnar upp í toppin á sølulistinum.

Tað er eingin ivu um, at høvundin er alt ov inspireraður av Ringanna Harri. Her eru alt ov nógvar áminningar um hobbar, álvar, óndar verur, Gollum

### Irons og Malkovich

Jeremy Irons spælir Broom. Hann gjørdist kendur fyri røðina Brideshead Revisited (Gensyn med Brideshead, 1981) og fekk tá eina Emmy-nominering, Britiska Filmakademi virðislønina og ein Golden Globe som Besti Leikari 1981. Vit kenna hann frá m. a. The House of the Spirits (Åndernes hus, 1993), filminum hjá Bernardo Bertoluccis Stealing Beauty (Forførende skønhed, 1996), Lolita (1997) seinast eg sá hann var í The Merchant of Venice (Købmanden i Venedig, 2004).

Sum óndi kongurin Galbatorix spælir eingin annar enn John Malkovich, ið er ein teim mest kendu karakterleikarunum frá USA. Hann kenna vit frá nógvum óførum filmum, so sum Steven Spielbergsa Empire of the Sun (Solens rige, 1987), meistaraverkið hjá Bernardo Bertolucci The Sheltering Sky (Under himlens dække, 1990), hann hveur leikt í filmunum hjá so kendum fólkum sum Michelangelo Antonioni & Wim Wenders, har hann leikti í Al di lá delle nuvole (Bag skyerne, 1995) og sjálvandi spældi hann í filminum hjá Spike Jonze Being John Malkovich.

Leikstjórin er royndur innan visuellar effektir, tí Stefen Fangmeier, hveur verið við at arbeitt á filminum hjá Steven Spielbergs Hook (1991), Jurassic Park (1993) og Saving Private Ryan (1998). Hann hevur arbeitt fyri Wolfgang Petersen The Perfect Storm (2000), Doug Liman The Bourne Identity (Manden uden navn, 2002), M. Night Shyamalan Signs (2002), Lawrence Kasdan Dreamcatcher (2003) og Peter Weir Master and Commander (2003). Við filminum Eragon fær hann debut sum leikstjóri.

### Flottur filmur, men vit kenna søguna

Hetta er í støðun ein líka so flott gjørdur filmur sum Ringana Harri triologiin. Tað er eitt tómrúm, nú hesir filmar eru útsendir í óendaligum directors cut DVD-fløgum, og nú tað er so leingi at bíða eftir næsta Harry Potter filminum, sum ikki kemur fyrr enn á sumri 2007.

Søgan um Eragon og bardagan móti Galbatorix, hjálparnar Brom og Murtagh og álvagentan Arya, minnir bara alt for nógv um ein lítlabeigga til Lord of The Rings, at eg sat og hugsaði um hendan filmin allan vegin.

## Fakta um Eragon

| | |
|---|---|
| Eragon | ED SPELEERS |
| Brom | JEREMY IRONS |
| Arya | SIENNA GUILLORY |
| Durza | ROBERT CARLYLE |
| Galbatorix | JOHN MALKOVICH |
| Murtagh | GARRETT HEDLUND |
| Onkel Garrow | ALUN ARMSTRONG |
| Roran | CHRIS EGAN |
| Hrothgar | GARY LEWIS |
| Ajihad | DJIMON HOUNSOU |
| Rødd Saphiru | RACHEL WEISZ |
| Horst | RICHARD RIFKIN |
| Sloan | STEVE SPEIRS |
| Angela | JOSS STONE |

Leikstjóri Stefen Fangmeier. 115 minuttir. 11 ára aldursmark. Frumframførdur í Havnar Bio 15. desember 2006.